## Spakin settur í

Nú er klárt at fara undir at byggja nýggja Blákrossheimið á Nesi í Eysturoy. Seinasta fríggjadag setti Símun Johannesen, borgarstjóri í Nes kommunum, spakan í grundsrykkið. Smápartafelagið Vestcon stendur fyri útgrevstri, planering og vegagerð, og er tað arbeiðið mett at kosta 788.000 krónur. Sjálvt byggiarbeiðið byrjar ætlandi í mai mánað, og gongst eftir ætlan, verður nýggja Blákrossheimið á Nesi liðugt um ársskiftið.

## Tunnil til Famjin

Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, heldur, at landsstýrið eigur at biðja Ísrak gera tunnil til Famjin. Tingmaðurin vísir á, at menninir hjá Ístak verða lidnir við Hovstunnilin seinni í ár, og hann heldur, at tað var eitt hugskot at biðja teir halda fram við tunli til Famjin aftaná. Sambært tingmanninum verður ein tunnil til Famjin 600 metrar, og skal Ístak hava boðið sær til at gera hann fyri 27 mió. krónur. Tað heldur tingmaðurin verða áhugavert tilboð.

# Høgni í Go' Morgen Danmark

**Í kvøld byrjar Høgni Lisberg á eini lítlari konsertferð í donskum biografum, ið hesum sambandi var Høgni í morgun gestur í morgunsendingini hjá TV2 Go' Morgen Danmark.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hesa vikuna verður sera virkin fyri Høgna Lisberg við eini lítlari konsertferð í donskum biografum og luttøku á AME-Reykjavík. Men longu í morgun legði Høgni og bólkur hansara fyri við at spæla í morgunsendingini hjá donskum TV2. Sendingin, ið verður send frá kl. 7-9 danska tíð hvønn gerandismorgun, er vorðin byrjanin á degnum hjá alt fleiri danum. Eisini tey, ið fara eitt sindur seinni upp kunnu fylgja við, tí kl. 9 verður hon endursend. Áður hava bæði Teitur og Eivør spælt í sendingini, og í morgun var tað Høgni, ið royndi seg. Høgni spældi tittullagið av nýggjastu fløguni Morning Dew og eitt spildur nýtt lag Being Out Of Town. Hetta lagið vísti ein heldur lívligan Høgna, og breyt nokkso fitt frá tí, sum vit kenna frá Høgna áður. Eitt sindur Jamirquai kent, men tó við Høgna Lisberg soundi.

Í kvøld kl. 19.00 byrjar konsertferðin í donskum biografum, hon er fyriskipað í samstarvi við Nordisk Film Biografer A/S. Lagt verður fyri í Metropol-biografinum í Keypmannahavn, mikukvøldið kl. 19.00 verður konsert í Bio-City í Odense og hóskvøldið kl. 19.00 í Biocity í Århus.

Atgongumerki fáast á www.biobooking.dk ella á telefon 70 13 12 11 millem kl. 9.30 og 21.30. 400 áskoðarar sleppa inn til hvørja konsert. Við í atgongumerkinum á er ein øl sum verður servera ein hálvan tíma áðrenn konsertin byrjar.

Seinastu tíðina hevur alt meira verið at hoyrt til Høgna í Danmark, hann verður spældur rættiliga fitt í donskum útvarpi, her vera serliga løgini Morning Dew og Just Dig spæld.



# Stanley við nýggjum lagi á myspace

**Føroyski útiseta trubadururin Stanley Samuelsen hevur eins og nógvir aðrir føroyskir tónleikarar fingið profil á myspace, her er millum annað møguligt at hoyra Stanley tulkað klassiska yrking.**



*Stanley Samuelsen er á veg til Føroyar*
*mynd: Símun Jóannesarson*

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Á myspace profilinum hjá fuglfirðinginum Stanley Samuelsen ber til at uppliva útgávuna hjá honum av nærum tíðarleysu yrkingini Tíðin rennur sum streymur í á eftir Fríðriki Petersen. Tvey løg eru frammanundan til yrkingina. Tað mest kenda er tað eftir J. Waagstein, ið m.a. norska songkvinnan Sissel Kyrkjebø hevur ríkað føroyskan tónleik við eini útgávu av, og eit lag eftir Hans J. Højgaard. Men Stanley gevur okkum nú sína útgávu av hvussu yrkingin kann syngjast á ein rættiliga peppaðan hátt.

Á síðuni ber eisini til at síggja, at Stanley verður at síggja á føroyskum palli í næstum.

Hann spælir í Losjuni í Haldarsvík 13. apríl, Stóra Pakkhúsi í Vági 14. apríl, í Kelduni í Skálavík 15. apríl, í Bygdahúsinum á Eiði 17. apríl og í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. 21. apríl. Eisini ber til at síggja, at útisetar í Århus fáa vitja av Stanley í Áarstovu 19. mai.

Men áðrenn Føroyar stendur á skránni, fer Stanley leygarkvøldið á pall í gamla prestagarðinum í Birkerød.

Vitjað Stanley á myspace.com/stanleysamuelsen